gult cyan magenta svart



**SJÓNLEIKUR. Leygarkvøldið fyri viku síðani varð nýskrivaði upprunaføroyski samtíðarleikurin »Eitur nakað land Week-end?« frumsýndur í hølunum hjá Grímu í gamla Meiarínum í Havn. Hesuferð ummælir Birgir Kruse og í næsta Vikuskifti ummælir Høgni Djurhuus sjónleikin**

# Eitur nakað land Week-end?




*Birgir Kruse við leikritinum og skránni til leikin »Eitur nakað land Week-end?«, sum hann, hóast atfinningarsamar viðmerkingar, er ovurfegin um*

*Mynd: Jens K.r. Vang*

UMMÆLI
*Birgir Kruse*

Leygarkvøldið untist mær at síggja annan leikin hjá Grímu, hetta leikárið. Tað var nógv umrøddi leikurin, sum Jóanes Nielsen skrivaði og vann fyrstu virðisløn fyri, tá Leikpallur Føroya skrivaði út leikritakapping »Eitur nakað land Week-end?«. Leikurin, sum er í sjey tættum varir hundrað minuttir og er uttan støðg.

## Ein góð íløga

Longu í føðingini var áhugin stórur fyri hesum leiki. Ein staðfesting av, hvussu væl mentunarligar krónur kunnu koma til høldar. Bara onkur setur sjøtil á. Hesaferðina var tað leikritakappingin. Væl vildi til, og leikurin kom á pall.

Henda veruleika kunnu vit eisini knýta til Eyðun Johannesen leikstjóra, sum eftir mong ár í Danmark, hevur leitað heim aftur. Og so teir yrkislærdu og professionellu leikararnir í Grímu. Og øll hini aftanfyri. Og Skipasmiðjan, ið sum einasti privati stuðul, lat pallin og alt tað, hann kostaði. Alt hetta er karmurin um tað mentunaravrik, sum hesin aktuelli leikur í roynd og veru er.

Hátíðarligt var hetta leygarkvøld í Meiarínum. Sum ein hugnalig ímynd av viðurskiftunum hjá leiklistini í Føroyum, stóð leikstjórin sjálvur og seldi atgongumerki. Her er eingin ov fínur at átaka sær sjálvt tær mest triviellu uppgávurnar. Og longur inn sá eg rithøvundan. Langleittur og tyktist ikki vita, hvar hann skuldi parkera seg sjálvan.

Føroysk listafólk hava eitt sjarmerandi smædni. Eisini hesin bersøgni yrkjari yviri við Strond. Ja, í Havn eru tveir borgarar, sum eru so tignarliga siðiligir, at ein øtast, tá list teirra kemur fyri dagin. Annar er Ingálvur og hin er Jóanes. Hin seinni var á Meiarínum.

## Einfeldni

Í handritinum eru bert fáar ábendingar um tað ytra í leikinum. Styrkin í handritinum er orðini, ið springa sum foli í føstu. Ytru, leiklistarligu ábendingarnar eru bert fáar. Tá er hent við einum royndum leikstjóra sum Eyðuni Johannessen og leikarum hansara í Grímu.

## Leikurin

Drigið varð fyri við gjøgnumskygdum, ljósum dúki. Ein ørkymlandi tóni og skurrandi royndarmyndin frá sjónvarpinum lýsti á dúkin. Ígjøgnum kundi vit síggja tey bæði Jóhannu (Katarinu Nolsøe) og mann hennara Thomsen (Kári Øster) gera klárt at fara. Tey eru heima í egnari stovu og tosa aftur og fram um dagligu tilveruna – og so dóttrina.

## Dótturin

Nakað er hent henni. Ábreiðslur flúgva bráddliga gjøgnum stovuna, Johanna letur okkum fáa varhugan av, at maðurin gongur við øðrum. Kanska eisini við dóttrini. Og tá orðið avgonga kemur fyri, er málsligi vøllurin strikaður av. Orð legst afturat orði, og vit eru inni í verðini hjá Jóanesi Nielsen. Kenst hvast eina løtu, men so linkar. Karmurin er har og er trúverdigur. Men veruliga hvat, ið hent er dóttrini, hongur enn sum ein opin spurningur. Alt ov opin eftir mínum tykki.

Leiklistarliga samanspælið hjá teimum báðum, Katarinu Nolsøe og Kára Øster, er ov ójavnt. Ikki er tað tí, at Katarina yvirspælir, nei hon er sannførandi og eksplosiv. Men okkum tørvar ein loðs, ella skipara, at greiða hetta trupla sinnið, sum hevur sovorðnan treða av dóttrini.

Um Jóhanna er skizofren ella okkurt annað er fyri sovítt óinteresant. Tað er leiklistarliga eg vil hava ein avkláring. Hvat er tað við dóttrini, sum nívir hana so? Hví er hon so friðleys, og hví søkir hon bert linna gjøgnum undirlívið? Ella er tað ein avleiðing frá nøkrum øðrum, ein fysiskur lynavleiðari?

Maðurin, harra Thomsen, stendur sum eitt hím í baksýni og veit sjáldan at geva henni svar uppá tiltalu. Hann kenst ov veikur. Hann gevur einki svar til sterku lystir og trongdir Jóhannu, sum hanga ósvaraðar í leysum lofti.

## Maðurin

Leiklistarliga vildi eg mett, at maðurin (Thomsen) var fjøðurin, sum konan trekti upp og spenti. Og so skuldi loysandi svarið komið frá honum. Í gronina á okkum. Á tann hátt kundu vit fingið ein møguleika at hugt niður í sinnisdýpið hjá Jóhonnu. Men gakk. Har er einki at heinta. Maðurin hongur bara uppi við henni sum ein viðfáningur.

Tað er spell, tí hann umboðar week-endlandið, landið uttanfyri. Hann er hin einasti »normali« at halda upp móti teimum, sum eru innilæst. Hesin mótfigurur gerst ov linur. Gevur ikki neyðuga mótspælið til vulkansku Jóhonnu. Og øll hini fyri sovítt eisini. Kanska er tað ætlanin, men mær tykist tað dekan og grunt og óforloyst.

## Tórálvur og Dia

Annarleiðis er við hinum monnunum á pallinum. Eitt nú Tórálvi (Hans Tórgarð). Hóast »Krypilin« hongur uppi við eina løtu, er hann so sannførandi, at hóast søga Tórálvs er hin ræðuligasta, so kenst hann í einum og øllum nærverandi. Viðkomandi og trúverdigur. Tú ert drigin inn á pallin, tá hann vevur sínar søgur, sum støðugt skifta millum grovkornað skemt, bóndalív í einingi og so – tá hann er allar bestur – lýsir viðurskiftini við pápan. Faðirin, sum lat sonin taka lívið av sær. Myndaliga talað, men við orðum Tórálvs. Tað gjørda fær onga vend, og eins og Morrison sigur hann, at hiðani komi eg ikki livandi útaftur. Hann missir tamarhaldið á sær, verður lagdur í spennitroyggju og næstu ferð, vit síggja hann, er hann bert ein skuggi av sær sjálvum. Tamdur á stongdari deild. Ein sonn líðingarsøga. Sum indiánin, ið tekur byrðina á seg í »Geykareiðrinum« hjá Keasy og  Foreman.

Triði maðurin er Dia (Egi Dam). Um hansara varrar kemur skaldskapur Jóanesar. Skyggjandi poetiskur. Í byrjanini kanska nakað klárur, ov klárur, í røddini. Men hann kemur skjótt á tónan og svingar við hinum. Inniligur, stillførur og støðugt fabulerandi.

Dia hevur verið í Grønlandi. Millum ísfjøllini hevur hann sent bønir til himmals og er ørkymlaður, um fallandi meteorar munnu smildra bønirnar ávegis til himmals. Ein so poetiskur tanki, at eg undrist yvir, at ikki júst hesin setningur varð valdur til heiti á leikinum, um so er, at heitið partú skuldi verða ein spurningur. »Kunnu bønir smildrast?« Hann liggur leingi á, tankin.

Dia kennur hvørja skútu í flotanum, maskinurnar við. So Venus kann Dia sjálvandi ikki knýta til annað enn línuskipið við sama navni. Og so stolta skapið á Pride. Skrokkin høvdu teir til felags. Sterkt og elegant. Stuttligt eisini.

Í Dia verður sjónvarpið og gleðin uttanfyri – í week-endlandinum – viðgjørd. Inniliga og ektað. Sum tá Peter Sellers sigur tey forloysandi orðini »I like to watch« og bara kennir til samfelagið gjøgnum sjónvarp og fjarstýring.



Jú, leikluturin Dia er sterkur og spennandi. Eins og hin hjá Tórálvi. Men meðan Tórálvur er ein – nú afturlatin – líðingarsøga, er hin hjá Dia opin og poetiskur. Hann hevur eina framtíð, hin onga. Og aftur her nema við hitt djúpt religiøsa, sum eyðkennir Jóanes, tá hann er bestur.

## Hervør og Tóta

Birita Mohr hevur leiklutin sum Hervør. Eftir málinum at døma er hon úr Vágunum. Eins og allar kvinnurnar, ein sannførandi mynd og persónur. Leikararnir hava sjálvir gjørt persónarnar. Í samráð við leikstjóra og medleikararnar. Tá tíðindafundur var herfyri, bar til at síggja uppsløg, har hesir persónar vóru lýstir. Fiktivir, men ektaðir. Trúverdigir og væl forankraðir við smálutum, sum skaptu heildina.

Ein lutur, sum skapti eina bókstaviliga klokkuklára heild kring Hervør, var eyknevnið Junghans. Eitt fjákut eyknevni, sum bara verður slongt inn á pallin, men so er tað har. Festir røtur, veksur og gevur meining í okkara mynd av persóninum. Frálíkt.

Kristina Hansen hevði leiklutin sum hin unga Tóta. Hon er køn í leiklist og eins og Jóhanna flýggjar hon undan ikki bara illum andum, men eisini jólunum og slaturi. Eins og hjá Jóhonnu hevur Tóta eina danska fortíð. Eitt áhugavert evni, sum eisini kann hugsast at sipa til enn eitt week-endland. Lovaða landið, har alt ber til, og tú bara riggar. Her heima dansa vit bara við devlum. Serliga á jólum.

## Røktarar

Høgni Johansen og Símun Pauli Hansen eru røktarar. Bara í kropsbygnaði eru teir trúverdigir. Símun Paula havi eg ikki sæð áður og kann verða, hann eisini hugsaði tað sama. Hann tyktist eitt sindur fjálturstungin. Tað hevur hann onga orsøk til. Men Høgni hevði eitt beint kropsligt mál, hart og kontant, antin tað snúi seg um medisin ella sproytur.

## Etingarlagið

Etingarlagið við borðið á deildini er primitivt, eins og orðalagið og atferðin. Meðan leikur fer, má eg sanna, at hetta kanska er ein av mongu avbjóðingunum í leikinum. Vit góðtaka primitiva etingarlagið. Men ikki meir. Orðalagið og atferðin verður ikki góðtikin á sama støði. Ein áhugaverdur snúningur.

## Bóndin

Ein óvæntaður partur í leikinum er bóndin. Hóast spælt verður uppá tað, er tað ikki hin veruligi og ógvuliga kjøtligi bóndin Tórálvur. Nei, hetta er stóri bóndin. Bóndin yvir øllum – tjóðskaparmyndin Jóanes Patursson.

Jóhanna, ið dansar við devlum, ger upp við hann. Stóru faðirmyndina. Senan er so burlesk og óvæntað, at eg má sodna hana leingi. Hetta er enn ein av staklutunum í handritinum, sum vekja ans og undran. Og liggja leingi á. Tað er eyðkenni fyri góðan dramatikk og skaldskap. Tankar, ið halda leingi og myndir, ið ikki bara eru bráðvakrar.

## Visuelt

Visuelt er leikurin einfaldur. Bert fáar effektir verða nýttar. Kanska ov fáar. Eftir byrjanina við royndarsignalinum hjá sjónvarpinum og einstøkum stroboskop-strálum, hevði eg væntað, at brotið, har Jóhanna leitar eftir teim illu andunum, varð sterkari. Men her var eingin ytri, teknisk effekt. Jóhanna skal sannføra okkum um illu andarnar við at renna hondina gjøgnum teir. Aftur eitt bíbilskt motiv frá Jóanesi. Um trúgv og vantrúgv. Men møguleikin at gera nakað spennandi visuelt burturúr hesum leikbroti verður ikki nýttur. Tað ger henda lítla partin óneyðuga veikan.

Sterki visuelli parturin er, tá bóndin verður parteraður. Einfalt, bæði við litum, ljósi og útgerð. Kendi meg stundum, sum læs eg í »At býta seyð og fletta« og stundum, sum var eg til ein Monthy Python film. Kanska tann filmin, har hin ovurfeiti etur seg til avlívis. Og sprotnar. Og eisini ein tilvísing til yrkingina »Hvat skulu vit gera við William?«

Hóast komikkin er uppgerðin har. Men eingin orsøk er at taka hetta illani upp. Hetta er ein álvarslig og almenn uppgerð, uttan annan vilja. Uttan at verða staðbundin og illavorðin. Og tó. Eitt prik hómast, treyðugt so. Ballónir bresta jú bara við prikum.

## Pallmyndin

Pallmyndin er einføld og myndar greitt ta afturlatnu deildina. Troystaleys, grá og køld. Men ikki kaldari enn neyðugt. Inngongdin ger dýpdina mittfyri, og tríggjar hurðar eru hvørju megin. Konufólkini og tey líka numrini vinstrumegin og menninir og ólíka numrini høgrumegin. Her er skil í. Rætt sum á eini afturlatnari deild. Eingin tilvild. Her á deildini skulu allir fløktir træðrir úr tilvildarliga week-endlandinum greiðast.

Ein góður táttur er hurðarnar, sum svinga báðar vegir. Blanka, stálkenda baksíðan gevur eina framúr góða symmetriska mynd, tá allar fara upp. Hetta einfeldni er hugtaknadi. Eins og ljósini, sum kunnu fáa kalda jarnportrið at tykjast sum spýr á kirkjugarði. Og afturvið tónleikinum hjá Stamen Stanchev kennast mangar pallmyndir kirkjuligar, so góðar eru kenslurnar, tær lata upp fyri. Heitar og hákirkjuligar. Og tað er ljósið, sum strálar henda hitan.

Nevnda symmetriin ger seg longu galdandi í byrjanini, tá gjøgnumskygda tjaldið verður drigið frá. Báðir røktararnir taka eftir medisini og geva – ja, sjúklingunum.

Og so verður eisini ein leikur lagdur inn í leikin. Læknaliga fráveran kemur her til orðana í einum leiki hjá teimum sjálvum um seg sjálvi, sum hin vituga Tóta stílar fyri.

## Heitið og tað poetiska

Heiti á leikinum er ein spurningur. Veit ikki, um tað er so vanligt við spurningi í einum heiti. Men forvitin gerst tú at hoyra, hvar heitið liggur í sjálvum tekstinum og hvagani í leikinum tað er tikið. Úr hvørjari hending, ella samrøðu tað sprettir.

Tá vantaði setningurin »Eitur nakað land Week-end?« fellir út móti endanum, er bakgrundin — samrøðan og hendingarnar – so veik, at eg má hugsa innan í mær sjálvum, hvat samanhangið er. Samanhangið og orsøkin at spyrja henda spurning er opinbær og klár. Ja, nærmast einføld og banal. Men við tað, at bara ein persónur umboðar »week-endlandið«, landið uttanfyri, so liggur nógv á hansara herðum. Tað er harra Thomsen. Hvørki í tekstinum, ella á pallinum, kemur hetta nóg sterkt og greitt fram. Tí stendur vulkanin Jóhanna og goysir út í tóman heim. Ikki tí hon yvirspælir, men tí hon fær so lítið svar. Ein spyr seg sjálvan, hví tey hava funnið saman, intelektuella vulkanin og meinaleysa dylhøvdið? Er hetta eitt tvangsektaskap, tey kalla? Og hvat hendir, tá hon fer heim?

Men hinvegin – er hetta komiska leikbýti tilætlað, so er tað í hvussu er væleydnað. Og tað til fulnar.

Thomsen er okkara hjálpari, at skilja fyrst og fremst Jóhonnu, at lata hana upp og síðani seta week-endlandið í relieff mótvegis afturlatnu deildini, so normalitetshugtakið kann dragast fram og fáa skap. Hesin partur er eftir mínum tykki hin mest undrunarsami í einum annars ómetaliga fjøltáttaðum, sterkum og innihaldsríkum leiki. Einum leiki, sum liggur leingi á.

Kanska er tað upplagt, at hesum rúmligi leikur eitur nakað so banalt sum »Eitur nakað land Week-end?«. Eg veit tað ikki.

Fremsta styrkin í leikinum er poetiski teksturin hjá Jóanesi Nielsen. Fyrst og fremst fer hann um varrarnar á Ega Dam, í leiklutinum sum Dia. Hóast ilt er at taka ein einstakan persón fram úr hesum kollektiva leiki á afturlatnu deildini, so er Egi ein samanseting av øllum tí góða í skaldskapi Jóanesar. Eisini elementini, tey stóru, sterku og ævigu, eru har. Grønland, skipini, ísurin, og tað kosmiska og religiøst fabulerandi. Avbrotið við dagligum veikleikum, ella realitetum, sum einum dildo. Her er styrkin í leikinum. Og fleiri eru tey heiti, sum liggja í dialoginum hjá Dia. Heiti, sum í størri mun kundu bent á tað poetiska, sum fremst av øllum eyðkennir leikin.

Til dømis tá Dia sendir bønir til himmals, men fryktar fyri meteorum og spyr »Kunnu bønir smildrast?« Ella poetiska regnmyndin móti endanum, sum leiðir til enn eitt heiti: »Regnar tað á dreymar?«

Trupleikin við verandi heitinum er, at tað í ov lítlan mun er rótfest í leikinum.

## Altjóða leikur

Leikurin »Eitur nakað land Week-end?« er í síni heild á aljóða støði. Her eru eingir staklutir, sum binda leikin afturat Føroyum og heimligum viðurskiftum eina. Parturin um »bóndan« kann saktans flytast til aðra mentan. Í øllum mentanum hava tílíkir undangongumenn verið. Tað veri seg politiskir, andaligir, fakfelagsligir ella aðrir leiðarar. Sjálvur tann staðbundni persónurin Jóanes bóndi er ikki sjálvur kjarnin í hesum burleska parti av leikinum. Tað er ímyndin av honum. Og so tann veruleiki, at einaferðina má uppgerðin koma. Uppgerðin við ímyndina.

## Frekkabók

Innan skúlaverkið hava tey leingi havt bæði brúnubók og bláubók. Síðani hevur hin politiska skipanin fostrað hugtakið hvítabók og svartabók. Nú hava vit so »frekkubók«, sum ein skemtiligur bókahandlari tók til um dagarnar.

Sipað varð til leikritið hjá Jóanesi Nielsen, sum nú fæst í bók. Men synd er at siga, at perman er frekk. Gamaní er hon reyð og ímyndar eitthvørt lívfrøðiligt. Men fulkomuliga vatndeyv, sæð í mun til eksplosiva innihaldið. Tað smæðist so ikki burtur handan nakra permu. Útgevari er Metanargrunnur Studentafelagsins og bókin, sum kostar hundrað krónur, telur 108 blaðsíður.




*Leikurin »Eitur nakað land Week-end?« verður sýndur á pallinum hjá Grímu í gamla Meiarínum í Havn. Hans Tórgarð hevur gjørt plakatina, sum á einfaldan hátt lýsir tey 6 leikandi*